# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*– Munurin millum hann og hinar 9.999 kemur tó til sjóndar, tá tað veruliga stendur á*

*Lau Laurse, FC Amager*



*Føroysku samstarvsfelagarnir hjá FC Amager eru rættiliga nógvir, og teir høvdu í gjár høvi til at hoyra um nakrar av spennandi framtíðarætlanunum hjá felagnum*

# FC Amager er framvegis føroyskt

**Hóast stórar ætlanir um superligu og multiarena innan næstu árini, so er Todi Jónsson onga løtu í iva um, at Føroyar og føroyskur fótbóltur framvegis eiga pláss á Amager**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hóskvøldið hevði FC Amager boðið føroysku samstarvsfeløgum sínum til borðs á Hotel Føroyum.

Síðani Todi Jónsson og aðrir íleggjarar fyri hálvum øðrum ári síðani tóku yvir í táverandi Fremad Amager, er eitt miðvíst arbeiði farið fram fyri at menna felagið. Og hóast tað ítróttarliga hilnaðist illa fyrsta hálva árið, tá niðurflyting gjørdist veruleiki, so hevur útbyggingin av fundamentinum í felagnum verið støðug. Eitt nú við at stovnseta FC Amager, sum er ein yvirbygningur av fleiri feløgum á donsku høvuðsstaðaroynni, har tað í dag búgva beint oman fyri 300.000 fólk.

Millum tað, sum varð lagt fram hósdagin var eisini ætlanin um eina nýggja multi-arena. Ein arena, sum FC Amager ikki verður einsamalt um, men sum tó ætlandi skal vera við til at lyfta fíggjarliga fundamentið í felagnum, soleiðis at at tað um nøkur ár er til reiðar at taka dystin upp við tey heilt stóru.

### Hjartað er føroyskt

Hetta saman við heilt ítøkiligu ætlanunum um at vera í superliguni um tvey ár, og við hesum økja lítla fótbóltsfelagið á Amager til at vera eina milliónaforrætning, fær kanska summi at halda, at føroyski parturin í framtíðini bert verður ein viðfáningur.

Men stendur tað til Toda Jónsson, so verður føroyski parturin verandi í FC Amager.

- Sjálvandi fái eg ikki garanterað, hvat hendir í framtíðini. Men eg fái í øllum førum sagt, at so leingi sum eg eri partur av hesum, verður føroyski parturin eisini ógvuliga týdningarmikil. Tað hevur nakað at gera við, hvar tú hevur hjartað, og Føroyar er jú mítt føðiland.

Men tá tú tosar um milliónaøkingar í umsetningini um og veldugar stadion-ætlanir við møguleikum fyri alskyns risa-stórum tiltøkum. Er tá ikki vandi fyri, at hjartað til tíðir má víkja fyri kapitalinum og kaldari forrætning?

- Tey bæði tingini nýtast als ikki at útiloka hvørtannað. Hartil hevur ein møgulig multi-arena sum so einki at gera við sjálvt FC Amager. Ætlanin er sjálvandi, at hendan skal vera við til at betra um møguleikarnar hjá fótbóltinum at virka, men tað er ikki so, at FC Amager við einum verður nøkur milliarda-forrætning. FC Amager er fyrst og fremst eitt fótbóltsfelag, har ein av ætlanunum er at menna føroyskar spælarar. Copenhagen Multi-arena er so øgiliga nógv annað enn bara fótbóltur, og talan er eisini um tvey feløg, sum tó hava tað til felags, at ein høvuðspartaeigari í báðum førum verður íløgufelagið hjá okkum, sigur Todi Jónsson.

Í mánadagsblaðnum verður hugt nærri at stórslignu stadion-ætlanini, sum varð løgd fram á tiltakinum hósdagin.

# Vil skapa fleiri Tiger Woods

**Tað eru 10.000 golf-spælarar, sum duga eins væl sum Woods. Kynstrið er bara at duga, tá tú skalt, sigur mentali venjarin hjá FC Amager**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ein av fyrilestrarhaldarunum á tiltakinum hjá FC Amager, var Lau Laursen, sum er mentalur venjari hjá besta liðnum hjá FC Amager.

Júst mentali parturin av spælinum er nakað, sum Todi Jónsson støðugt hevur lagt stóran dent á, og Lau Laursen legði í sínum fyrilestri dent á, at tað júst er tann mentali parturin, sum kann lyfta spælararnar seinasta pettið fram á leið.

- Besta dømið hava vit helst innan golfítróttin.

- Tað er væl eingin ivi um, at Tiger Woods er besti golf-spælarin, sum nakran tíð hevur verið. Men veruleikin er samstundis, at tað finnast á leið 10.000 spælarar, sum duga eins væl sum Woods at raka eina golfkúlu.

- Munurin millum hann og hinar 9.999 kemur tó til sjóndar, tá tað veruliga stendur á. Tú skalt ikki snara handliðinum serliga nógvar metrar, tá tú slært fleiri 100 metrar, og meira enn nakar annar, so dugir Tiger Woods at brúka tankarnar til júst aktuella slagið, tá mest stendur á. Og tað er fyrst og fremst hetta, sum ger hann fantastiskan. Mín uppgáva við FC Amager er so at royna at fáa spælararnar at geva sítt allar besta, júst tá hetta er neyðugt, segði mentali venjarin millum annað.

# Vunnu 3-1 á Sri Lanka

**Føroyska talvlandsliðið fekk eina góða byrjan upp á talv-OL, sum í hesum døgum verða telvað í Dresden**

TALV
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Heini Olsen, John Rødgaard og Martin Poulsen vunnu allir síni talv, og tað var nóg mikið til at tryggja føroyingum ein 3-1 sigur, tá føroyska landsliðið í gjár fór undir sín fyrsta dyst í OL-kappingini. Joan Hendrik Andreasen tapti á fjórða borði.

Í øðrum umfari, sum byrjar klokkan 14 í dag, skulu Føroyar telva móti Pakistan. Pakistan vann 3,5-0,5 á Monaco í fyrsta dystinum. Pakistan er annars styrkismett sum nummar 139, meðan Føroyar eru mettar sum nummar 73. Men sigurin á Monaco vísir tó, at Pakistan helst er væl sterkari, enn ratingin annars sigur, so lagt er av álvara upp til spennandi dyst. Og sjálvandi ber eisini til at fylgja við í hesum á alnetinum, har leinkja til kappingina er at finna á www.faroechess.com